# Samgongan tekur ikki undir við uppskotinum hjá Tjóðveldisflokkinum

**Eingin av samgonguflokkunum sigur seg taka undir við uppskotinum hjá Tjíðveldisflokkinum um at selja fiskiloyvi á uppboði. Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, heldur tað vera spentan upp á uppskotið, men metir, at avleiðingarnar kunnu vera miðsavning, og at pengarnir fáa mest at siga**



*Væntandi fer Bjørn Kalsø at leggja uppskot fyri tingið í heyst*

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í vikuskiftisblaðnum skrivaði Sosialurin, at Tjóðveldisflokkurin arbeiðir við einum uppskoti um nýggja fiskiveiðilóggávu. Tórbjørn Jacobsen, framsøgufólk í vinnumálum hjá Tjóðveldisflokkinum, segði, at enn var uppskotið ikki liðugt orðað, men at ætlanin er at gera eina liberala skipan, har fiskiloyvi verða seld á uppboðssølu.

Um Tjóðveldisflokkurin verður liðugur at orða uppskotið fyri ólavsøku, verður tað væntandi lagt fyri Løgtingið, tá tingfólk kemur saman á ólavsøku.

Tjóðveldisflokkurin kann tó neyvan rokna við, at eitt tílíkt uppskot fær undirtøku í tinginum.

Sum Sosialurin skilir, er lítil áhugi í samgonguni at stuðla einum tílíkum uppskoti.

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum fyri Sambandsflokkin, sigur seg vera spentan upp á at síggja uppskotið og fegnast um, at Tjóðveldisflokkurin kemur við einum greiðum fiskivinnupolitikki, sum hann málber seg, tí heldur hann hevur vantað.

– Tjóðveldisflokkurin hevur brúkt nógva orku upp á at fýlst á, so tað er positivt, at tey koma við einum uppskoti, sigur Bjørn Kalsø.

### Staðfesta ognarrættin

Landsstýrismaðurin undirstrikar, at tað sjálvandi er torført at gera viðmerkingar til eitt uppskot, sum hann ikki hevur sæð, og sum ikki er endaliga orðað. Men hann metir tað verða torført at broyta fiskivinnupolitikkin frá degi til dags.

Bjørn Kalsø metir, at tá privatir selja fiskiloyvi sínámillum, kann landið eisini selja.

– Tað er týdningarmikið, at fáa staðfest ognarrættin, men vinnan skal hava brúksrættin, sigur Bjørn Kalsø.

Hinvegin metir landsstýrismaðurin, at uppboðssøla kann føra til størri miðsavnan, tí sambært honum verður tað neyvan ein og hvør, sum fær møguleika at fáast við skip, um pengarnir fáa ein avgerandi leiklut.

Bjørn Kalsø fer sjálvur sum fiskimálaráðharri at leggja uppskot fram í hesi tingsetuni, sum inniber, at landið kann selja fiskiloyvi, men loyvi verða ikki tikin inn aftur, sigur hann. Væntandi verður uppskotið lagt fyri tingið í heyst.

Bjørn Kalsø undirstrikar sum nevnt, at hann ikki hevur sæð uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum, men heldur tað vera áhugavert at fáa eitt orðaskifti, sum hann tekur til. Hinvegin heldur hann, at radikalar broytingar mugu gerast líðandi.

# – Vit fara ikki at taka grundarlagið undan teimum smáu



*Henrik Old heldur, at um fiskiloyvi verða seld á uppboði, fer útjaðarin í Føroyum ongan fisk at fáa*

**Henrik Old úr Javnaðarflokkinum heldur tað ikki vera skilagott at selja fiskiloyvi á uppboði. Hann metir, at hetta fer at taka grundarlagið undan teimum smærru virkjunum**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Henrik Old er formaður í vinnunevndini í Løgtinginum og framsøgumaður í fiskivinnumálum fyri Javnaðarflokkin.

Hann væntar, at uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum um at selja fiskiloyvi á uppboði verður trupul at praktisera, men vísir á, at hann sjálvandi ikki hevur sæð uppskotið enn.

Hann vísir á, at sum er hava skipini eitt 10 ára loyvi, og at hetta verður trupult at taka frá teimum. Henrik Old vil vera við, at tað var Tjóðveldisflokkurin heitti á táverandi fiskimálaráðharra at taka loyvið frá Jógvan S, tí annars skuldi hetta fáa avleiðingar fyri viðkomandi landsstýrismann. Hetta kostaði sum kunnugt landskassanum 2,6 milliónir.

Henrik Old undrast eisini á, at hetta upskotið kemur frá Tjóðveldisflokkinum.

– Teir hava sitið við buktini og báðum endum og átt allar møguleikar at gjøgnumført hatta, sigur Henrik Old, og heldur fram, at Tjóðveldisflokkurin var við til at gera núverandi skipan.

– Ein maður var ímóti hasum, tað var Heini O. Heinesen, men hann var trumlaður niður av sínum egnu, sigur Henrik Old.

Javnaðartingmaðurin heldur, at um fiskiloyvi verða seld á uppboði, fer útjaðarin í Føroyum ongan fisk at fáa.

– So kunnu til dømis Hvalba og Vág bara pakka saman, sum hann tekur til.

### Tann sterkasti vinnur

Henrik Old heldur, at ein slík skipan fer at miðsavna, og tað verða tey, sum mest brúk fyri fiski, tey størstu virkini og ta størstu skuldina, sum fara at kunna keypa.

– Hevur tú 230 milliónir í skuld, er tað klárt, at bankin fer at játta lán til fiskidagar ella –loyvi, so skuldin kann gjaldast aftur. Tað verður tann sterkasti, sum vinnur. Tað fíggjar ikki ein kjaftur eitt skip, sum ikki hevur loyvi, sigur ein bersøgin Henrik Old.

Eins og Anfinn Kallsberg, sigur hann seg stúra fyri, at útlendskur kapitalur fer at gera seg galdandi gjøgnum føroyskur strámenn, hóast tað eisini kann koma fyri undir núverandi skipan.

– Er hetta ringt, so verður tað verri, heldur formaðurin í vinnunevndini.

– Vit fara ongantíð at ganga við til at taka frá teimum smærru virkjunum, sigur Henrik Old, og vísir á, at avleiðingin verður, at so fara tey stóru virkini einsamøll at avgera prísin, tí tey kunnu avtala hann innanhýsis. Henrik Old sigur seg hava avreitt uttanlands í meira enn 35 ár og kennir líknandi dømi aðrastaðni.

– Vit skulu hava uppboðssølu av fiski, ikki av loyvum. Vit vilja ikki taka grundarlagið undan teimum smáu, tí so verða tað teir við størst skuld, ið sleppa at keypa, sigur Henrik Old.

## – Fiskivinnupolitikkurin skal viðgerast í samgonguni

**Anfinn Kallsberg, formaður Fólkafloksins, sigur seg ikki kunna taka undir við, at fiskiloyvi verða seld á uppboði**



*Anfinn Kallsberg metir, at fiskivinnan hevur brúk fyri tryggleika, og tað heldur hann ikki, at hetta nýggja uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum fer at geva vinnuni*

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Tað verða neyvan Anfinn Kallsberg ella restin av Fólkaflokkinum, sum fara at trýsta á ja-knøttin, tá atkvøðast skal um uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum um nýggja fiskiveiðilóggávu.

Hóast Tórbjørn Jacobsen segði í Vikuskiftis-Sosialinum, at uppskotið var liberalt, so himprast formaður Fólkafloksins ikki við at kalla tað vinstravent.

– Hatta er tað mest sosialistiska uppskotið í longri tíð, men tað er gott at Tjóðveldisflokkurin avdúkar, hvør hann er.

– Men tað er kanska eitt sindur nógv at krevja, at ein gjøgnum-sosialistiskur flokkur skal vera samdur við ein borgarligan flokk, sigur Anfinn Kallsberg, og sipar serliga til teirra støðu til vinnuøkinum.

Anfinn Kallsberg er sostatt ikki samdur við Tjóðveldisflokkin í hesum máli.

Hann vísir á, at fiskivinnan hevur brúk fyri tryggleika, og tað metir hann ikki, at hetta nýggja uppskotið fer at geva vinnuni.

– Eitt loyvi uttan skip er einki vert, og eitt skip uttan loyvi er heldur einki vert, sigur Anfinn Kallsberg, sum sigur seg stúra fyri, at útlendskir keyparar fara at gera seg um seg og keypa loyvi við hjálp frá føroyskum strámonnum.

Anfinn Kallsberg sigur seg annars ikki tíma at brúka tíð og orku upp á hetta uppskotið frá tí størsta andstøðuflokkinum, og heldur, at fiskivinnupolitikkur skal viðgerast í samgonguni.

– Hetta er alt ov vigtugt til at viðgera í bløðunum, sigur Anfinn Kallsberg.